# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Hondbóltslandslið á rættari kós

Í kvøld fer hondbóltslandsliðið aftur á vøllin. Hesaferð ímóti Sveis. Tað gleðiliga er, at okkara landslið hesaferð er mannað við best hugsandi spælarum. Til seinastu dystirnar vóru tíverri ikki allir okkara bestu spælarar við vegna karantenu. Hóast henda karantena nú er farin úr gildi, so er kortini rætt at tríva í hetta málið enn einaferð.

Vit hava øll hoyrt um landssliðið, sum spældi á Balkan og har fleiri av spælarunum eftir dyst endaðu í býnum ímóti teimum óskrivaðu reglum, sum annars er fyri spælarum á slíkari ferð. Vit duga ikki taka dagar ímillum, hvør gjørdi hvat og hvør hevði rætt ella ikki. Men niðurstøðan hjá tí sera avgjørda landsliðsvenjaranum varð so tann, at hann kundi ikki góðkenna framferðina hjá fleiri av spælarunum og setti tí fleiri teirra í karantenu við tí avleiðing, at landsliðið mátti spæla týðandi dystir við einum amputeraðum liði.

Ikki nóg mikið við tí. Ein av spælarunum og kanska okkara besta trumpkort í altjóða dystum, fekk enn harðari revsing, nevniliga forboð fyri at spæla á landsliðnum alt hetta árið. Orøkin skuldi vera tann, at hann hevði gingið venjaranum ov nær við at kritisera hann alment. Vit eru ikki førir fyri her at siga júst, hvat er hent og hvør hevur "skyldina" í hvørjum. Sjálvandi hevur ein venjari við síni ábyrgd eisini skyldu til at krevja disiplin av spælarunum. Hinvegin tykist tað vera eitt sera drastiskt stig at taka at geva spælara karantenu fyri eitt heilt ár, tá vit eru við í so avgerandi aljóða kapping, "bara" tí at hann ikki tolir at hoyra meiningina hjá einum av sínum spælarum. Í veruleikanum revsar sami venjari ikki bert henda spælara, hann revsar øll tey í Føroyum, sum eru glað fyri og góð við hondbóltin. Eins og í øllum øðrum lívsins viðurskiftum er einki bara svart og hvítt. Og dialogurin er til fyri at verða brúktur. Tá so nevndin í Hondbóltssambandinum, HBS nú bráddliga broytir avgerðina hjá venjaranum og avtekur karantenur og loyvir umrødda spælara at vera við aftur á liðnum, so er hetta í veruleikanum ein ordans lúsingur til venjaran. Tað er í hvussu er logikkur at ressonera so. Spurningurin er tí, hvussu lætt tað verður hjá venjaranum at halda fram í starvinum.

Vit ynskja okkara landsliði alt tað besta, og vit vóna eisini, at umrødda umstoytta avgerð kann geva liðnum nýggja styrki og harvið vinna Føroyum virðing aftur. Hondbóltur er vorðin ein so mikið vælumtókt ítrótt, at agg, yvirreagering og væntandi dialogur má ikki sleppa at stýra allari gongdini. Er nakað farið skeivt fram má og skal dialogurin verða fremsta málið, og tað sýnist í hvussu er nevndin í HBS at hava tikið til eftirtektar. Tað kann heldur ikki vera serliga hugaligt hjá teimum, sum fíggjarliga vilja halda lív í hesum landsliði, at vit ikki stilla upp við sterkastu manning. Vónandi hava øll í hesum máli lært av hesum. Koyr á Føroyar.

**Sosialurin**

## Snorksova kappingaráðið, tryggingareftirlitið - og ikki minst fjølmiðlarnir?

FINNLEIF GUTTESEN



Tryggingarfelag Føroya (FT) hevur eina lýsingaherferð um, at 20% av okkara tryggingargjøldum verða endurrindað, um vit eisini verða limir í »Betri Pensjón«.

Er hetta ikki at fuppa tryggingartakaran?

Tí FT hevur seinasta árið hækkað allar tryggingar við 15 til 20% og samstundis skarvað av produktum, ið kunnu tryggjast. Aðrar tryggingar hækkaðu 80%, tí tryggingargjald og skaðaútgjald gekk líka upp, altso, FT hevði ongan vinning men heldur einki tap.

Henda framferð kann kanska góðtakast, um allar tær tryggingar, sum FT bert hevði vinning uppá, lækkaðu. Men sum øll vita, so er veruleikin ein heilt annar, tryggingarnar bert hækka.

Sjálvsábyrgdin er eisini hækkað eini 50%, so samlaða hækkingin tað seinasta árið má verða minst 20%.

Er hetta yvirhøvur loyviligt?

Er hetta ikki at snýta tryggingartakaran, so tað forslær? Fyrst hækka allar tryggingar 20% og síðani lova eina minking upp á allar tryggingar við 20%, men bert um tú bindir teg til »Betri Pensjón«.

Er tað nakar, ið tosar um góðan lýsingarsið ella etikk?

Hvar er verjan hjá tryggingartakaranum?

TF hevur eitt umboðsráð og eina nevnd, ið sær út til at siga ja og amen til alt, sum leiðslan kemur við. Ráðið skal eitast at vera valt av tryggingartakarunum, men hvørji áhugamál hevur hetta ráð, kunnu vit spyrja. Er tað bert fundarpeningurin, ið hevur áhuga, tá ið TF sleppur at »fuppa« tryggingartakarin soleiðis.

Livst so spyrst.

## Føroyskur rúsdrekkapolitikkur viðgjørdur á landsstevnu hjá Bláa Krossi

**Um vikuskiftið hevur Blái Krossur ta árligu landsstevnuna. Í ár er hon í Miðvági. Føroyskur rúsdrekkapolitikkur er eitt av evnunum, sum er á skránni**

TÍÐINDASKRIV
*Blái Krossur*

Landsstevnan verður hildin í Miðvági, og verða missiónshúsið og kirkjan karmar um tiltøkini.

Stevnan byrjar við aðalfundi leygarmorgunin 21. mars klokkan 10.30, og eftir ein døgurðasteðg verður pallborðsfundur kl. 14.00, har evnið "Føroyskur rúsdrekkapolitikkur" er til viðgerðar. Við pallborðið sita Pál Weihe, formaður í Fólkaheilsuráðnum, Jóhan Dahl, landsstýrismaður, Jákup Mikkelsen, formaður í Løgtingsins Trivnaðarnevnd, Hjalmar Hansen, aðalskrivari hjá Bláa Krossi Føroya og Gunnar Nattestad.

Seinni verður greitt frá blákrossarbeiðinum heima og úti. Nógv er hent seinasta árið, serliga viðvíkjandi umsorganarheiminum í Grønulíð og arbeiðinum við teimum heimleysu. Kringvarpið vísti herfyri eina sending, sum var gjørd um heimið, og á ein sera góðan hátt lýsti tað arbeiði, sum verður gjørt har.

Umframt hesi tiltøkini verður eisini kvøldseta kl. 19.00 har Gimmi Olsen, gudfrøðingur, talar um evnið: Guds umsorgan. Leygardagurin endar við einum ungdómstiltaki, sum BKU skipar fyri.

Sunnudagin er gudstænasta í Miðvágskirkju og stórt familjutiltak kl. 15.00 fyri alla Vágoynna. Hetta tiltakið er eisini í kirkjuni. Landsstevnan endar við einum blákrossmøti í Missiónshúsinum kl. 18.00. Øll tiltøkini eru almenn.

Sí skrá á heimasíðuni www.blakross.fo.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.